# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# KRINGVARPIÐ HAVA GÓÐ KOR

– Fyri at bjarga Kringvarpinum, skal Kringvarpið missa sínar lýsingar - ongantíð ov skjótt!

So greiður var fyrrverandi tíðindaleiðarin í sjónvarpinum, Øssur Wintherheig, í sendingini Reflektión í sjónvarpinum fríggjakvøldið. Sendingin hevði miðlarnar á breddanum hetta kvøldið, og høvið var húsagangurin hjá Dimmalætting og avgerðin hjá Sosialinum at tillaga útgávudagarnar úr fimm niður í tríggjar.

Hin gesturin í sjónvarpsstovuni fríggjakvøldið var Uni Arge, journalistur. Hann helt, at tað er neyðugt at hava ein klett í føroyska fjølmiðlalandslagnum, sum skal vera púra óheftur av øllum, og sum kann framleiða dygdargóða information, sum vit kunnu líta á – Kringvarp Føroya. Hann legði afturat, at um vit skulu stóla 100 prosent uppá, at Kringvarp Føroya framleiðir dygdagóða information uttan ávirkan frá nøkrum, so er best at hetta verður gjørt uttan lýsingarkrónur, men so má okkurt setast í staðin.

Slíkt er áhugavert hjá okkum í privatu miðlunum at hoyra. Tí tað er beinleiðis kappingaravlagandi, at ein almennur stovnur - sum krevur kringvarpsskatt inn frá fólki - skal sleppa at kappast við privatar miðlar, sum bara liva á handilsligum grundarlag. Tað ringasta av øllum er, at løgtingið fyri fleiri árum síðani hevur tikið støðu til, at lýsingarnar í Kringvarpinum skulu niðurlagast. Men tað hendir bara ikki. Tvørturímóti dubbar Kringvarpið seg í kappingini - og í fleiri førum verður lýsingatilfar smoygt inn í sendingar, eitt nú tá morgunsendingin má fortelja, hvat merki bilurin er, sum tey koyra í - og hvør bilasøla eigur hann, ella tá Kringvarpið selur lutaseðlar saman við privatum fyritøkum, sum sleppa í útvarpsstovuna afturfyri.

Kringvarp Føroya er ein týdningarmikil mentanarstovnur. Tað er ein stovnur hjá okkum øllum, sum vit eiga at stuðla og stimbra. Men tað skal ikki vera á handilsligum grundarlag. Kringvarpið er ein




public service stovnur, sum tað so ofta og so pent verður sagt. Ein publicservice sáttmáli millum Kringvarpið og Mentamálaráðið er eisini ávegis onkustaðni.

Tí eigur politiski myndugleikin at geva Kringvarpinum tær sømdir, sum stovnurin skal hava - og lata privatu miðlarnar um handilsliga partin. Tað er og verður so parturin hjá privatu miðlunum at tryggja, at journlistiski integriteturin verður hildin í hásæti.

## Kunnu ikki kappast móti einum sum krevur skatt



# Eivør er óektað og pátikin

Virda danska tónleikaritið Gaffa er ikki mjúkt at strúka í ummæli av konsert hjá Eivør Pálsdóttir í Keypmannahavn í gjárkvøldið. Ummælarin hjá Gaffa letur Eivør tvær av seks stjørnum, og ummælarin er rættiliga speiskur í sínum ummæli. Troels Frøkjær skrivar millum annað, at Eivør virkar pátikin og óektað.

– Okkurt ger, at tú troytast rímiliga skjótt av Eivør. Eg sleppi ikki undan kensluni av nøkrum óektaðum og pátiknum í teimum stóru teatralsku faktunum og ógvusligu skríggjunum, sum skulu boða frá einari frumkraft, ið eg ikki haldi er til staðar. Eivør hevur klistrað tvær grønar fjaðrar á tann trevsuta kjólan og á handliðið í eini roynd at virka gátuført. Tað virkar bara ikki uppá meg, sigur ummælarin hjá Gaffa.

Troels Frøkjær heldur, Eivør hevur ein góðan og vælspælandi bólk, og hon er ein góður og orginalur sangari, men hann keddi seg til konsertina og fangaði seg sjálvan í at hyggja eftir klokkuni fleiri ferðir.

– Eivør spældi fleiri sangir frá komandi fløgu sínari, sum hon lovar kemur út í heyst. Ta fløguna fari eg ikki at standa í kø fyri at keypa, sigur Gaffa-ummælarin.

*eydun@sosialurin.fo*



## Ger Norröna eykatúr til fastlandið?

BEINTA Í JÁKUPSSTOVU
KJAK Á SÍÐU 12



## Rinda skuldina alt fyri eitt

JÁKUP BECH JENSEN
KJAK Á SÍÐU 14

# Føroyar mitt í rúgvuni

Heimasíðan Speedtest.net hevur kannað, hvussu skjótt internet er í meira enn 180 londum kring heimin. Heimasíðan kemur fram til, at í Suðurkorea gongur skjótast at downloada, og í Litava er besta uploadið. Føroyar eru nummar 71 á listanum yvir download og nummar 58 á listanum yvir upload.

# Laksaprísurin lækkar av øskuni



Prísurin á laksi á europeiska marknaðinum er fallandi. Orsøkin er, at avmarkingarnar í flogferðsluni gera, at tað ber ikki til at flyta laks úr Europa til USA og Fjareystur í sama mun sum vanligt. Tí verður laksur seldur á ES marknaðinum ístaðin, og útboðið er stórt, lækkar prísurin.

Vinnuhúsið skrivar, at hetta ávirkar eisini føroyska alivinnu, sum flytur stórar nøgdir av laksi umvegis Bretland til USA við flogfari.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*